UTTAN ÚR HEIMI

# Hermenninir skulu úr Irak



*Bretskir hermenn á varðhaldi í Basra har suðuri í Irak*

**Bretar vilja ikki bíða eftir, at viðurskiftini í Irak koma í rættlag. Hermenninir skulu heimaftur sum skjótast**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Bretlandi hevur mótstøðan ímóti krígnum í Irak ongantíð verið so stór sum nú, og flestu bretar vilja hava hermenninar heimaftur, sama hvussu støðan í Irak er, skrivar The Daily Telegraph.

Tað sæst í einari kanning, sum YouGov hevur gjørt fyri The Daily Telegraph. Har siga 57 prosent av teimum spurdu, at tað var skeivt av George W. Bush og Tony Blair at fara í kríggj fyri Irak, og 55 prosent krevja, at teir bretsku hermenninir verða tiknir úr Irak beinanvegin ella innan eitt ár. 39 prosent halda, at hermenninir skulu verða verandi har, til irakar sjálvir eru førir fyri at tryggja lóg og landaskil.

Tony Blair kann sambært kanningini ugga seg við, at hansara veljarar taka undir við avgerð hansara at leypa á Irak. 54 prosent av teimum spurdu veljarunum hjá Arbeiðaraflokkinum siga, at Blair gjørdi tað rætta. Tað halda bara 30 prosent av teimum konservativu veljarunum.

# Aftur ein forseti fyri rættin í Haag

**Fyrrverandi liberiski forsetin Charles Taylor situr nú í varðhaldi í Haag skuldsettur fyri krígsbrotsverk.**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Minni enn ein mánað eftir at Slobodan Milosevic tók lívið av sær í einum kliva í Haag, hava starvsfólk hjá krígsbrotsmannadómstólinum gjørt ein annan kliva kláran til fyrrverandi liberiska forsetin Charles Taylor. Eins og Milosevic er hann skuldsettur fyri krígsbrotsverk og brotsverk ímóti mannaættini.

Upprunaliga skuldi Charles Taylor koma fyri ein ST-dómstól í Sierra Leone, men myndugleikarnir har bóru ótta fyri ófriði í sambandi við málið, sum tí bleiv flutt til Haag.

Charles Taylor kom til Haag í dag. Tann 58 ára gamli fyrrverandi forsetin er skuldsettur fyri rllivu ymisk krígsbrotsverk í Liberia og grannalandinum Sierra Leone tíðliga í áttatiárunum. Hann er eisini skuldsettur fyri at hava byrjað borgarakríggj í Liberia í 1989 og fyri at hava verið virkin í borgarakrígnum í Sierra Leone. Her skal hann hava medvirkað til fleiri grov krígsbrotsverk, eins og hann er skuldsettur fyri at hava brúkt børn sum hermenn.

### Kanska bara tann fyrsti

Mannarættindafelagsskapir eru sera fegnir um, at Charles Taylor kemur fyri ein dómstól hjá ST, tí teir halda, at tað kann fáa aðrar afrikanskar leiðarar at hugsa seg um, áðrenn teir bróta altjóða lóg. Tað er heldur ikki vist, at málið ímóti Charles Taylor verður tað seinasta av sínum slagi, tí dómstólurin er longu í ferð við at kanna viðurskiftini í Kongo, Sudan og Uganda, har áhaldandi ófriður hevur kostað fleiri milliónir mannalív.

Fyri fjúrtan døgum síðani sat Charles Taylor í margglætishúsum sínum í Nigeria, har hann hevur búð, síðani hann noyddist at fara frá. Í síðstu viku varð hann tikin á markinum ímillum Nigeria og Kamerun, og í dag kom hann til Haag. Steðgurin har kann gerast drúgvur.

## Oyða frumskógin

Tey seinastu árini er Kina farið at innflyta nógv ólógligt timbur úr teimum tropisku økjunum, og sambært umhvørvisfelagsskapinum Greenpeace kann tað enda við, at frumskógurin í Indonesia verður oyddur um eini tíggju ár. Greenpeace sigur, at Kina keypir serliga nógvan tropiskan við úr Indonesia og Papua Ný Guinea, og at 90 prosent av innflutninginum er ólógligur, tí talan er um hótt trø.

Kinesiska stjórnin roynir at forða tí ólógliga handlinum, og fyri nøkrum døgum síðani skrivaðu Kina og Burma undir ein sáttmála, sum skal forða kinesiskum fyritøkum at keypa frumskógarvið úr Burma. Greenpeace og aðrir umhvørvisfelagsskapir hava víst á, at umleið 70 prosent av viðinum, sum Kina fær úr teimum tropisku økjunum, verður brúktur til vørur, sum verða seldar av landinum. Tí royna felagsskapirnir at fáa onnur lond at gevast við at keypa tær kinesisku vørurnar.

Á einari ST-ráðstevnu í Brasil í síðstu viku kom fram, at um tíggju ár verður eingin frumskógur eftir í Indonesia, og at tað sama fer at henda í Papua Ný Guinea um eini 15 ár, verður einki gjørt fyri at bjarga frumskóginum.

## Kennir seg misbrúktan

Sangarin og friðarmaðurin Bono harmast um, at hann verður misbrúktur í valstríðnum upp undir tað komandi tjóðartingsvalið í Italia.

Í einum bóklingi, sum flokkurin hjá Silvio Berlusconi, forsætisráðharra fer at senda í hvørt hús í næstum, skrivar Berlusconi, at Bono hevur takkað sær fyri ta hjálp, sum Italia hevur veitt teimum fátæku londunum.

– Fyri meg er tað als eingin æra at fáa pláss í hansara valstríði, og harafturat kenni eg meg misbrúktan, sigur Bono við italska blaðið Corriera della Sera. Sambært Bono hevur Berlusconi heldur ikki so nógv at rósa sær av, tá tað snýr seg um at hjálpa teimum fátæku londunum.

– Síðani Berlusconi gjørdist forsætisráðharri, er italski stuðulin til tey fátæku londini minkaður, so nú er landið niðast av teimum 22 londunum, sum geva mest eftir fólkatalinum, sigur Bono við Corriera della Sera.

## Fleiri fáa krabbamein

Nýggj hagtøl vísa, at talið á krabbameinstilburðum í Noregi veksur altsamt, og at í 2004 vórðu 24.434 nýggir tilburðir staðfestir.

Tað merkir, at talið á krabbameinstilburðum er vaksið heili 80 prosent síðani 1953, tá farð varð undir at skráseta tilburðirnar. Tølini vísa, at allir aldursbólkar fáa krabbamein, men at tey flestu kortini eru eldri fólk. Av monnunum, sum fáa krabbamein, eru 86 prosent eldri enn 55 ár, og hjá kvinnunum er talið 78 prosent. Samstundis vísir tað seg, at krabbamein gerst alt meiri vanligt hjá børnum, og nú fáa umleið 150 norsk børn krabbamein um árið.

Hagtølini frá 2004 vísa, at rættiliga nógv fólk fáa krabbamein í tjúkktarminum ella endatarminum. Tað árið fingu 3.482 norðmenn krabbamein í tarmunum.

## Bannað at selja gøgn

Í mong ár hava kinesisk sjúkrahús forvunnið væl av peningi burtur úr at selja gøgn av avrættaðum fangum, men nú hevur stjórnin í Beijing sett forboð fyri slíkum handli, skrivar AP.

Sambært heimsheilsustovninum WHO eru tað serliga útlendingar, sum keypa ymisk gøgn frá teimum kinesisku sjúkrahúsunum, men sambært WHO verða fangarnir ikki spurdir, um teir vilja lata lata øðrum gøgnini.

Eingin veit við vissu, hvussu nógvir fangar verða avrættaðir í Kina um árið, men mannarættindafelagsskapir vilja vera við, at talið er onkunstaðni ímillum 5.000 og 12.000. Tað er nógv meiri enn í nøkrum øðrum landi, og áhaldandi atfinningar hava nú fingið myndugleikarnar at mæla dómstólunum til at avmarka deyðadómarnar, skrivar AP úr Beijing.